

*Passaligir banalir tekstir, sum fólk duga. Nakrar svakliga festligar klaksvíkingar á pallin og so sjálvandi Shaky. Blandingin var háeksplosiv, tá Dynamitt enn einaferð prógvaði, at teir eru ein bólkur útyvir tað vanliga*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Dynamitt




seinasta. Hóast livitíðin var stutt, so brakaði Chase ígjøgnum føroyska tónleikapallin seinasta partin av 80'unum. Harður rockur, sum eingin í Føroyum hevði spælt tað fyrr, og sum veruliga kundi lyfta fjøldina uppfrá, tá spælt var live.

Ein stórt uppsligin konsert á Hálsi í Havn gjørdist als ikki tann væntaða upplivingin fyri nøkrum árum síðani, men hesa ferð var formurin hjá rock-gubbunum í lagi. Edmund Jacobsen kláraði kanska ikki heilt upp til teir hægstu tónarnar, men hann ígjøgnum við bara at skrála tað út ella við at fáa áskoðararnar at hjálpa sær. Og við Niclas Johannesen í ikki minni stórformi setti Chase og flott og feitt punktum fyri SummarFestivalinum.

DJ-eitt-ella-annað var í Flagstjaldinum, tá vit spákaðu okkum heimaftur, men tað telur líka sum ikki við. SummarFestivalurin snýr seg ikki um at venda plátum ella at stýra samanblandaðum MP3-fílum. SummarFestivalurin snýr seg um tónleik og hugna, og bæði av hesum livdu sítt fantastiska góða lív í Klaksvík hetta vikuskiftið. Og tað fer tað eisini at gera um eitt ár, kann eg heilsa og siga.